**Fríggjadagin hava vit hesi tilboð:**

**Tiger termokanna**
við mynstur
Nú kr. 98,-

**Eva bakiformar gummi**
ymisk snið
Nú 1/2 prís

**Grýtur aluminium v/ belegningi**
-33 1/3 %



PF. VALDEMAR LÜTZEN
Vágsbotn • Postboks 20 • 110 Tórshavn • Tel. 31 16 75 • Fax 31 08 22

**Tilboð Menturnarnátt**

Ein vørusending av skúlataskum
-25%



Hjalmar Jacobsens
bóka- og pappírshandil
Niels Finsensgøta 14 • Postrúm 309 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311584 • Fax 319284 • handil@post.olivant.fo
www.bokahandil.fo

**MENTAN Í SKILLING**
7. juni



Síggj myndir frá fyrr
til kl. 23.00

SKILLING
N.Finsensgøta 23 • Tel. 312225 • Fax 310525

**TILBOÐ**
fríggjadagin 7. juni

Klædningur
svartur
vanligt kr. 1.800,-
kr. 1.000,- fríggjadagin

Leður jakki
3/4 svartur
vanligt kr. 1.299,-
kr. 700,- fríggjadagin

Onnur góð tilboð

Kallkyn
Vágsbotnur • Tel. 31 62 06

**Bilar**

Nr. 105 • hósdagur • 6. juni 2002 • 76. árg.



*Eins og Skoda Oktavia líkist Superb einum VW innan. Her við leðursetrum, nøtutræpanelum og Tiptronic automatgearum*

# Skoda Superb – nýggjur luksusbilur frá Skoda



*Skoda Superb er bygdur yvir ein 10 cm longdan VW Passat plattform. Bilurin kann m.a. leverast við leðursetrum, Xenon-lyktum, og 17" sportfelgum*

**Skoda eru rættuliga farnir at gera um seg í luksusklassanum. Skoda Superb, ið er bygdur yvir ein 10 cm longdan VW Passat plattform, er ein sera væl útgjørdur luksusbilur, ið verður gjørdur á eini nýggjari bilverksmiðju hjá Skoda í Tjekkia.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Síðan VW konsernin yvirtók Skoda, eru teir so nógv broyttir, at í veruleikanum er talan um VW bilar við smávegis broytingum og Skoda búmerkjum. Seinasta nýggja er Skoda Superb sum skal kappast við teir størru luksusbilarnar. Bilurin fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur, Classic, Comfort og Elegance. Superb er stórur og rúmligur við góðum beinplássi og stórum viðførisrúmi. Hann kann leverast við m.a. leðursetrum, Xenon-lyktum, automatgear við Tiptronic og 17" sportfelgum.

**Navnið frá 1934**

Tað er ikki nakað nýtt at Skoda ger luksusbilar, og navnið Superb er heldur ikki nýtt. Í 1920 og 30´unum gjørdu teir fleiri luksusbilar. Skoda Superb, ið kom á marknaðin í 1934, var tann største og fínasti við 6 syl. 2,5 litur motori. Í 1938 fekst Skoda Superb við 8 syl. 4,0 litur motori við 95 hk. Tann Superb, ið nú kemur á marknaðin, fæst við 5 ymiskum bensin og dieselmotorum. Størsti bensinmotorurin er ein 2,8 litur V6 við 193 hk, og størsti dieselmotorurin er ein 2,5 TDI V6 við 155 hk. Í Danmark liggja prísirnir frá 300.000 krónum til næstan hálva millión.

# Meriva – spanskur mini-MPV frá Opel

**Ein nýggjur Opel verður frumsýndur á bilaframsýningini í Paris í heyst. Framleiðslan byrjar eftir ætlan fyrst næsta ár á Opel bilverksmiðjuni í Zaragoza í Spanien.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hóast Meriva verður nakað minni enn Opel Zafira, líkjast teir í innrætting og útsjónd. Báðir eru teir sera rúmligir og arbeiðsligir, og setrini kunnu lættliga gerast um, uttan at neyðugt er at taka tey úr bilinum. Meðan Zafira kann hava upp til sjey sitipláss, hevur Meriva fimm. Setrini eru løtt at flyta ella leggjast heilt niður, um bilurin skal brúkast sum vøruvognur. Meriva er styttri enn Zafira, men hevur somu aksilfrástøðu. Í stødd verður Meriva millum Opel Zafira og Opel Agila. Frá Opel verður sagt at kvaliteturin innan er á sama støði sum nýggi Vectra. Meðan Opel Mevira verður gjørdur í Spanien, verður eisini ein Chevrolet Meriva gjørdur í Brasilien. Tann Brasilianska og evropeiska útgávan verða ikki heilt eins hvat viðvíkur motorum, setrum og koyrieginleikum.

*Kelda: Tíðindakriv frá General Motors Danmark*



*Tá Opel Meriva kemur á føroyska og danska marknaðin á várið 2003, fæst hann bæði við diesel og bensinmotorum frá 75 til 125 hk*